

## Pílagrímurin minnist altíð

- Ein lítlan ryggsekk – hann verður 100 g. tyngri fyri hvønn km tú gongur
- Góðir skógvar, sum eru væl gingnir til
- At lata seg í sum ein leyk – lag omaná lag
- Regnklæði, sólbrillur, sólkrem, kepp, vatn, okkurt søtt, eyka hosur, compeed-plástur, tannbust.
- Og sjálvandi: Onga fartelefon!

## Sjey pílagrímshugtøk



Tað einfalda
Tað stilla
Tað seina
Frælsið
Stúrið ei
Felagsskapur
Andligheit



*Pílagrímsferðin gevur millum annað tíð til at hugsa, hugsveima og hugleiða um tilveruna, og kanska at endurskoða galdandi avgerðir, vanar og veruleikar*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Søgan

Pílagrímsferðir eru í næstan øllum religiónum. Men her um okkara leiðir fóru tær í søguna við siðaskiftinum og Luther. Orsøkin var, at tær umboðaðu gomlu katólsku fatanina av, at tú kundi bøta syndir tínar við gerðum, til dømis við at gerast pílagrímur. Tí vóru pílagrímar ein vanlig sjón á gøtunum í Europa í miðøldini. Men fyri familjurnar hjá teimum dømdu vórðu avleiðingarnar óbótaligar, tá forsyrgjarar vórðu sendir út á landavegin at ganga í mánaðir og ár. Tey múgvandi kundu tó altíð leiga seg inn hjá einum professionellum pílagrími. Lógin álegði fólki at geva pílagrímum lívd og mat, tí hetta var tað sama sum at taka ímóti Jesusi. Men tað gjørdist eisini ein hentur háttur hjá fátækrafólki at yvirliva. Sostatt gingu í hundraðtúsundatali av fólki og bóðu og slitu skógvarnar millum bíggja niðri í Europa, til Luther fekk enda tí, í øllum førum norðanfyri.

Fyribrigdið hevur tó fingið eina endurføðing í protestantiska heiminum síðstu fimti árini. Serliga í Noregi og Svøríki eru pílagrímsferðir vanligar. Har eru góðkendar rutur, feløg, herberg og miðstøðir til pílagrímar. Síðstu 10-15 árini hevur ein lítil bólkur av dønum eisini tikið hugtakið til sín, og hava spakuliga ment seg til eina lítla rørslu, sum skipar fyri ferðum í Danmark.